Vestmanna Fiskavirkið

Fastlønta fólkið nú uppsagt

Sjálvt stjórin er ikki fastløntur meira: "Men eg haldi fram sum stjóri á virkinum, sigur Dánjal Jákup Andreassen

Seinasta hósdag fingu tey umleið 10 fastløntu starvsfólkini á Vestmanna Fiskavirkið boð um, at tey frá 1. september ikki longur kundu halda fram at arbeiða á virkinum sum fastlønt.

Hvat hendur hjá tykkum?

–Sum hjá øllum øðrum virkjum í landinum, so fáa vit minni og minni at gera, minni fiskur kemur uppá land og broytingarnar í starvsviðurskiftunum hjá teimum fastløntu á virkinum er ein avleiðing av hesum, sigur Dánjal Jákup Andreassen, stjóri.

Er tú sjálvur uppsagdur sum fastløntur?

–Ja, eisini eg. Tá eg varð settur í satrv, fekk eg til uppgávu at reka flakavirkið og eg eri ikki settur frá hesi uppgávu, sigur Dánjal Jákup Andreassen.

Er vandi fyri, at tit fara at steingja?

–Tað haldi eg ikki, tað er løgið, at eitt virkið, sum klárar at svara hvørjum sítt, skal lata aftur, sigur Dánjal Jákup Andreassen, stjóri.

jústinus

Bókalisti yvir føroyskt tilfar



FØROYSKUR BÓKALISTI 1989-91 FØRO

Permuttut. Færøerne rundt - en guide. - 1.-3. útg. við tilfinum: Færøerne rundt - en guide. (Skarv's friluftsserie). - 1.-4. útg., 1. uppl. Holte : Skarv, ávikavist 1984, 1985, 1986 og 1988. - Partvist gjørd eftir: Kreuzenbeck, Ulrich: Faröer. 2. útg. ; Dusseldorf 1983. - ISBN 87-7545-279-0 Ob. : kr. 110.00.

Færøernes fugle → Bloch, Dorete. Plakat med Færøernes fugle.

Færøernes Lagting / Færøernes Lagting. - 1984/1988- . - Tórsh. : Føroya Lagting [avgr. Løgtingsskrivstovan] [Box 208, 110]. 1985- . - (32.805).

4: hvørt ár. - Eisini í enskari og føroyskari útgávu.

1988/1992 : [tekst: Jógvan Jespersen]. - 1990. - Faldari ([12] s.) : myndir ; 21 cm.

Faldari : økvpis.

Færøernes Landsstyre → Føroya Landsstýri.

Færøernes oprindelse i ord, billeder og på kort → Rasmussen, Jóannes, f 1912.

Upphav Føroya í orðum, myndum og á korti.

Færøhesten → Michelsen, Ólavur, f 1933.

Færoische Briefmarken → Føroysk frímerki.

Færøsk anthology / ved V. U. Hammershaimb ; [gevið út hevur Hammershaimbsgrunnurin]. - Ljósmyndað offset-endurprent. [2. uppl.]. - [Tórsh.] : Bókagarður, Emil Thomsen, 1991. - 2 bd. ; 21 cm. - (65.41).

1. útg. ljósmyndað offset-endurprent 1969.

Ib. : kr. 380.00 (1.-2. bd.).

1. [bd.] : Tekst samt historisk og grammatisk indledning. - [2], cxxiv, 460 s.

2. [bd.] : Ordsamling og register / udarbejdede af Jakob Jakobsen. - [2], 471 s.

Færøsk borfortegnelse → Føroyskur.

Samsagdur tekstur á føroyskum og enskum. - A permun: Faroe Sea Food.

[Árg.] 1988- : [1989] - 46 s. : myndir ; 30 cm.

Ob. : ikki í bókaboðum.

[Árg.] 1989- : [1990] - 42 s. : myndir ; 30 cm.

Ob. : ikki í bókaboðum.

[Árg.] 1990- : [1991] - 32 s. : myndir ; 30 cm.

Ob. : ikki í bókaboðum.

Føroya Fiskasøla → Faroe Seafood news.

Føroya Fiskimannafelag: Arsfrágreiðing.

Føroya Fiskimannafelags fyri ... / [Føroya Fiskimannafelag] ... [Árg.] 1976- . - [Tórsh.] [Bryggjubakka. Box 58, 110] : Føroya Fiskimannafelag, 1976- . - (63.976).

Framhald av: Føroya Fiskimannafelag: Arsfrágreiðing.

[Árg.] 1988 / løgd fram á landsfundi 29. og 30. desember 1989 av Óla Jacobsen. - [1989]. - 64 s. : myndir ; 22 cm.

Ovast á titulblaðnum: Arið hjá fiskimonnum.

Ob. : ikki í bókaboðum.

[Árg.] 1990 / løgd fram á landsfundi 28. og 29. desember 1990 av Óla Jacobsen. - [1990] - 64 s. : myndir ; 22 cm.

Ovast á titulblaðnum: Arið hjá fiskimonnum.

Ob. : ikki í bókaboðum.

[Árg.] 1991 / løgd fram á landsfundi 29. og 30. desember 1991 av Óla Jacobsen. - [1991] - 104 s. : myndir ; 22 cm.

Ovast á titulblaðnum: Arið hjá fiskimonnum.

Ob. : ikki í bókaboðum.

Føroya Fólkaháskúlafelag: Árbók fyri ... / Føroya Fólkaháskúlafelag. - [1. arg.] (1916) - . - Tórsh. : Føroya Fólkaháskúlafelag, 1917- . - (37.41).

1988/89 (49. [arg.]) / [lagt til rættis: Bjørgfinnur Nielsen og Fróðinn Jacobsen]. - [1991]. - 97 s. : myndir ; 21 cm.

Ob. : ikki í bókaboðum.

Føroya fuglar → Bloch, Dorete: Myndataivan "Føroya fuglar".

Føroya Gjaldstova 50 ár : 1939-1989 / ritstj.: Hans Thomsen. - Tórsh. : Føroya Gjaldstova, 1989. - 113 s. : myndir ; 23 cm. - (33.7).

Ib. : kr. 250.00.

Føroya Handilsskúli: Arsfrágreiðing / Føroya Handilsskúli. - 1972/73- . - Torsh. : [Postsmoga 177, Marknagilsvegi 77, 110] : [Føroya Handilsskúli], [1973]- . - (65.07).

Ikki tilkomin fyri árini 1985/86-1988/89

Fyri skulaárið 1989/90. - [1991]. - 69 bl. : 30 cm.

Ob. : ikki í bókaboðum.

Føroya Handilsskúli: FHS : grundutbygving í fyrisiting, handli og skrivstovu stytt til FHS / Føroya Handilsskúli. - [4. útg.]. - Torsh. (Postsmoga 177, Marknagilsvegi 77, 110) : Føroya Handilsskúli, 1990. - 24 s. : myndir ; 21 cm. - (65.07).

3. útg. 1988.

Ob. : økvpis.

Føroya Handilsskúli → Handilsskúlan.

Føroya Handilsskúli. 2. HH flokkur: Namsferð i Hetland: 28.-30. august 1989 / 2. HH. - [Tórsh.] : [Føroya Handilsskúli], [1990]. - [35] bl. : myndir ; 30 cm. - (33.18397; 43.97 Hetland).

Ob. : fyrst ikki.

Føroya Idnaðarfelag: Arsfrágreiðing. - 1988- . - [Tórsh.] : [Box 179, R. C. Effersøesgøtu 30, 110] : [Føroya Idnaðarfelag], [1989]- . - (60.954).

[Árg.] 1988- : [1989] - [2], 11 s. ; 21 cm.

Ob. : ikki í bókaboðum.

[Árg.] 1989- : [1990] - [2], 12 s. ; 21 cm.

Ob. : ikki í bókaboðum.

[Árg.] 1990- : [1991] - [3], 14 s. ; 21 cm.

Ob. : ikki í bókaboðum.

Føroya kunngerðasavn A og B fyri ... - Arið 1990- . - Tórsh. : Føroya Landsstýri, 1991- .

Føroyski bókalistin 1989-1991 er eitt yvirlit yvir tað føroyska bókatilfarið, sum skrásett er á Føroya Landsbókasavni í tíðarskeiðnum 1989-1991.

Í listanum eru umleið 900 skrásetingar av ymiskum bókum, ritum, ritgerðum, bløðum og tíðarritum. Øll hesi rit hava tað til felags, at tey annaðhvørt eru føroysk, eru skrivað av føroyingum, ella at tey á onkran hátt viðgera Føroyar ella tað, sum føroyskt er. t.d. eru eisini skrásettar í hesum lista útlendskar bøkur og ritgerðir, sum snúgva seg um føroysk viðurskifti, ella sum eru skrivaðar av føroyingum á øðrum máli.

Nevnast kann, at hesi trý árini vóru útgivnar 428 bøkur á føroyskum. Av hesum vóru 228 týðingar.

Føroyska bókaútgávan hesi trý árini kann bólkast soleiðis:

Fagurbókmentir:
Óbundin mál 28 (13 týðingar)
Bundið mál 12 (1 týðing)
Yrkisbókmentir: 124 (21 týðingar)
Skúla- og lærubøkur: 61 (23 týðingar)
Barnabøkur: 203 (170 týðingar)
Í alt **428 bøkur** (228 týðingar).

Hesar umleið 49.000 síðurnar kosta umleið 51.000,- kr. Eru bøkurnar longu uppseldar, skuldi tað borið til at lænt tær á bókasøvnunum.

Føroyskur Bókalisti 1989-1991 er 61 síður, og kostar 50 kr.

Vísti tú...
...at SMS FOTO hevur eina
Canon
lit-kopimaskinu, sum m.a. kann:
taka eitt petti úr einari ella fleiri myndum og seta saman, sum tú vilt??
SMS FOTO
Tlf. 19820

Djóralækni
Jórun Sumberg Olsen
Undir Glaðsheyggi 7 - 100 Tórshavn
Viðtala eftir avtalu á tlf. 18388

Sinnisbati
Frítíðarhølið í Krossgøtu 15 er opið mikukvøld kl. 19—22.

Blindastovnur Føroya
hevur opið mánadag—fríggjadag kl. 9—16.
Telefonir: 18222 og 19288.

Møtirøð við Paul Hanssen

Evni: **Ævinleikin.**

Hvønn týdning hevur hann fyri teg? Eru tað bert ein Himmal og Helviti? Hvat er endamálið við okkara tilveru?

Komið og hoyrið hvat Guðs Orð sigur um hesa og aðrar spurningar í møtirøðini, ið byrjar:

Fríggjakvøldið kl. 20 og heldur áfram
leygarkvøldið kl. 20 og
sunnukvøldið kl. 19.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

SAMKOMAN IMMANUEL
Brekkutún 3, Hoyvík
P.O. Box 1104 - FR-110 Tórshavn
Tlf. 18182